Fyribyrgjandi venjingarnar byrja eftir summarfrítíðina og halda fram til páskir, ella har á leið.

Kostnaðurin fyri venjingarnar er **20 kr. fyri hvørja venjing.** Við í prísinum er frukt og vatn at leska sær við.

Tað er í løtuni ikki neyðugt at søkja um hesa tænastuna. Tað er bara at møta upp.

Venjingarnar eru á Mørkini 2 dagar um vikuna og á Grønanesi 2 dagar um vikuna. Nakað frammanundan at byrjað verður, verður lýst her á heimasíðuni, hvørjar dagar venjingarnar verða, klokkutíð, koyring o.s.fr.